STARVSLÝSING

# Starvsfólk til havnadeildina

Søkt verður eftir fólki til havnadeildina at taka sær av eftirliti, viðlíkahaldi og innsavning av dátum í sambandi við vind-, aldu- og streymmátingar. Havnadeildin hevur ábyrgdina av málum viðvíkjandi havnum og lendingum, fysiskari planlegging á sjónum, geofysiskum og meteorologiskum mátingum og øðrum.

### Arbeiðsuppgávur

Uppgávur, sum tú í høvuðsheitum skal røkja, fevna eitt nú um:

– Uppseting og viðlíkahald av veðurstøðum.
– Útlegging og viðlíkahald av steym- og aldumátarum.
– Góðskutryggja tær dátur, sum verða innsamlaðar.
– Fyrireika veðurdátur til heimasíðuna.
– Skráseta dátur í dátagrunni Landsverks umframt aðrar fyrifallandi uppgávur.

### Førleikakrøv

Sóknast verður eftir fólki við áhuga og útbúgving innan kt-økið, og sum hevur tekniskan førleika og áhuga fyri at menna verandi skipanir. Tú hevur góð samstarvsevni, skal duga at skipa títt arbeiðsøki og geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum, umframt vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt. Neyðugt er at hava vanligt koyrikort.

### Setanarviðurskifti

Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Umsóknir

Umsóknir við prógvum, møguligum ummælum og lívsgondarlýsing (CV) verða at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postsmoga 78,
FO 110 Tórshavn,

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. oktober, 2006. Merk umsóknina »Starvsfólk til havnadeildina« og viðmerk, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ewald Kjølbro, deildarleiðara á havnadeildini, fartel. 540 861, teldupostur ek@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

STARVSLÝSING

# Verkfrøðingur til vegadeildina
## (endurlýsing)

Vegna ov fáar umsóknir verður søkt á nýggjum eftir verkfrøðingi til vegadeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast. Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

### Arbeiðsuppgávur

Uppgávur, sum tú í høvuðsheitum skal røkja og standa fyri:
– Planlegging.
– Programmeringar, forkanningar, prosjektgransking av tunnils- og brúgvaprosjektum.
– Byggja upp og standa fyri eini rakstrar- og viðlíkahaldsskipan av tunlum og brúm.
– Skipa og leggja til rættis haldið av tunlum og brúm.
– Luttaka í norðurlendskum samstarvi innan økið.
– Myndugleikaumboðan.

### Førleikakrøv

Sóknast verður eftir verkfrøðingi við royndum ella áhuga innan omanfyri nevndu virkisøki. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, so sum góð samstarvsevni, at tú dugir at skipa títt arbeiðsøki, er førur fyri at eggja og ganga undan, er miðvísur og kann geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum.

### Setanarviðurskifti

Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Verkfrøðingafelagið.

### Umsóknir

Umsóknir við prógvum og lívsgondarlýsing (CV) verða at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. oktober, 2006. Merk umsóknina »Verkfrøðingur vegadeildin« og viðmerk, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina Eysturoy, deildarleiðara á vegadeildini, fartel. 540 881, teldupostur he@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

**KLÆÐIR TIL KVINNUR OG MENN**




**WRANGLER SHOP**

**N. Finsensgøta 23 · Tlf. / Fax 31 47 10**



Vit hava leingi opið leygardagin 28. okt.

**VOGUE**

M. Heinasonargøta 23
Tlf. 312380

KLÆÐIR TIL TA KLASSISKU KVINNUNA